Shell ikki við sviðusoð av Brent Spar

– Eg kann ikki ímynda mær, at Brent Spar fer at ávirka møguleikan hjá Shell at fáa loyvi at bora eftir olju á føroysku landgrunninum. Hetta hevur einki við hvørt annað at gera. Tá tað snýr seg um oljuleiting og boring, er Shell eitt tað mest álítandi felagið, sigur Hjarnar Djurhuus, stjóri á Shell.

KARTIN L. HANSEN

Hjarnar Djurhuus óttast ei, at Brent Spar boripallurin fer at forða Shell at fáa lut í einari møguligari oljuvinnu í Føroyum

Oljufelagið Shell er enn eina ferð í andgletti. Hesa ferð orsakað av boripallinum, Brent Spar, sum ætlanin er at søkkja 50 fjórðingar úr føroyska fiskimarkinum.

Altjóða samfelagið er á gosi um avgerðina, og Shell hevur verið rakt av boykotti, eina mest í Týsklandi.

Vildu ikki gevast í Suðurafrika

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Shell er í andgletti. Fyri nokrum árum var ágangurin ímóti Shell eisini øgiligur. Hetta var orsakað av, at Shell ikki vildi gevast við virksemi sínum í Suðurafrika, hóast nærum øll lond í heiminum høvdu samtykt handilsboykot mótvegis Suðuraftika, sum mótmæli ímóti apartheid-politikkinum.

– Orsøkin til, at Shell ikki vildi gevast í Suðurafrika var tann, at vit mettu tað vera betri fyri landið, um vit hildu fram. Fyri tað fyrsta høvdu vit greiðar reglur fyri, hvussu nógv litt fólk skuldu sita í leiðsluni. Haraftrat stuðlau vit fakfeløgum. Fyri tað næsta vildi tað skatt landið nógv meira, um vit góvust við virkseminum, tí tað hevði tikið landinum nógva tíð at reisa seg aftur, greiður Hjarnar Djurhuus, stjóri á Shell, frá.

Einki óvanligt við ágangi

Hann heldur eisini, at tað er vanligt hjá stórum altjóða fyritøkum av og á at vera í andgletti.

– Hetta er nakað sum hendir við jøvnum millumbilum. Vit kunnu bara minnast á, tá Exxon Valdes rendi á land í Alaska. So hetta er nakað øll altjóða feløg vera fyri fyrr ella seinni, sigur Hjarnar Djurhuus.

– Men er hetta ikki just nakað, ið øll feløg áttu at royna at sloppið undan?

– Nú kenna vit eitt sindur til náttúruverndarfelagsskapir, og vit vita, at teir fara eftir stórum og kendum málum, ið geva pening og har teir kunnu gera vart við seg. Shell er ein stór altjóða fyritøku, so tað er greitt, at hesir felagsskapir leggja eftir Shell av og á, sigur Hjarnar Djurhuus.

Ikki fyri vanbýti

Hann óttast ikki fyri, at Shell skal vera fyri vanbýti orsakað av Brent Spar, um tað eina ferð kemur so langt, at borað verður eftir olju á føroyska landgrunninum.

– Hetta hevur einki við hvørt annað at gera. Tá tað snýr seg um oljuleiting og boring, so verður Shell roknað fyri at vera eitt tað mest álítandi felagið, so eg óttist ikki, at vit vera fyri vanbýti, sigur Hjarnar Djurhuus.

– Vit hava jú einki ólógligt gjørt. Verri var, um vit høvdu forbrotið okkum, sigur Hjarnar Djurhuus.

Hann minnir á, at tað er bretska stjórnin, sum hevur endaliga orðið at siga í hesum málinum, og at tað er hon, ið hevur tikið støðu til, hvar og hvussu boripallurin skal beinast burtur.

– Tað eru myndugleikarnir, ið gera av, hvussu burturkast skal burturbeinast. Vit eru noyddir at gera eftir teirra boðum, men hetta leggja náttúruverndarfelagsskapir doyðin á, sigur Hjarnar Djurhuus.

Minnir um grindaheróferðina

Hann heldur, at tann máti, ið Greenpeace hevur framborið málið, minnir nógv um ta viðferð, Føroyar hava fingið frá djóraverndarfelagsskapum í spurningum um grindadráp.

– Allir upplýsingar, sum føroyingar hava givið djóraverndarfelagsskapum, hava verið sópaðir av borðinum. Í fjølmiðlunum verða føroyingar sagdir at vera blóðtystir og grindadrápið at vera ein ítrótt.

– Eg havi einki ímóti slíkum felagsskapum, men vit mugu kunna krevja, at tað teir bera fram er rætt, og at teir mugu halda seg til sannleikan, sigur Hjarnar Djurhuus.

Meðan kjakast verður dúligani um Brent Spar bæði her heima og úti, so verður boripallurin framvegis sleipaður ímóti ætlaðu leiðini, har hann skal søkkjast. Í gjár vistu tíðindastovirnar at siga, at Brent Spar helst verður eitt sindur seinkaður.

Fólk frá Greenpeace seta eitt model av Brent Spar boripallinum upp framman fyri høvuðsskrivstovuna hjá Shell í Haag fyri at mótmæla søkkingini *Mynd: DimL/Reuter*

● Ein 22 ára gamal froskmaður úr Kjøpinhavn er druknaður út fyri Kullen í Svørík. Bert fáar dagar frammunadan hendi ein onnur druknivanlukka á sama stað, tá ein svensk kvinna leyp á bláman í eini royndt at bjarga 3 ár gamla soni sínum, sum var dottin útí.

Læraraløninirnar kanska í Fólkatingið

Um einki hendir í lønarsamráðingunum millum Føroya Lærarafelag og landsstýrið hesa vikuna, noyðist felagið aftur til Danmarkar at fundast við fíggjarmálaráðharran, sum, sambært lóg um tænastumannalønir, má gera eitt uppskot hesum viðvíkjandi og síðani fara í Fólkatingið við tí. – Hetta hava vit ongantið roynt áður, sigur formaðurin í Føroya Lærarafelag, Esmar Berg.

BEATE L. JENSEN

Lønarsamráðingarnar millum Føroya Lærarafelag og landsstyrið ganga ongan veg. Tað stendur í botni partanna millum.

Hetta upplýsir formaður felagsins, Esmar Berg, fyri *Dimmalætting*.

– Tað er í minsta lagi ein favnur ímillum partarnar, sigur hann.

Fundur var millunm partarnar í landsstýrinum seinasta mikudag, men har hendi hvørki eitt ella annað.

Hvussu hetta fer at enda, er óvíst.

Einasta, ið gerast kann, er enn einaferð at fara til Danmarkar at tosa við myndugleikarnar har. Í hesum føriunm verður tað fíggjarmálaráðið,sum felagið má greiða frá tí fastlæstu støðu, ið komið er í.

Stendur í botni

– Vit hava ongantið roynt hetta fyrr, sigur Esmar Berg, sum í januar í ár saman við øðrum umboðum fyri felagið var í Danmark í somu ørindum.

Lærarafelagið vil hava sama sáttmála við somu løn at galda nú sum tá lønarsteðgurin kom í gildi í 1993, sigur fakfelagsformaðurin.

Tá fóru fastløntu læararnir niður við sløkum 8 pst. og hinir leysu við 8,5 pst.

Tað, sum Lærarafelagið vil samráðast um nú og hava sáttmála við landsstýrið um, er lønin frá 1. mars í ár, tá galdandi sáttmáli fór úr gildi.

Hvussu tað kemur at ganga við lønarsamráðingunum, sum fyri langt síðani skuldu verið komnar uppá pláss, dugir Esmar Berg, formaður, ikki at siga.

Sleppa ikki í verkfall

– Ið hvussu er lata vit hesa vikuna ganga. Síðan mugu vit síggja hvat hendir og um vit verða noyddir at fara til Danmarkar við málinum, sigur formaðurin í Lærarafelagnum.

Allir lærarar í føstum størvum eru tænastumenn og hava ikki loyvi at fara í verkfall.

Lógin sigur, at tá ósemja er um lønarsáttmála hjá tænastumonnum, skal fíggjarmálaráðharrin koma við einum uppskoti um semju, sum síðani skal leggjast fyri Fólkatingið.

Men støðan er hon, at Fólkatingið kemur ikki saman aftur fyrr enn í oktober, so tað verður leingi at bíða.

Misti peningurin í Rættin

Tá er ikki vist at føroyska tænastumannaósemjan, sum snýr seg um lønarsáttmálan millum Føroya Lærarafelag og landsstýrið kemur fyri longu alt yvir eitt tá.

Heldur ikki tykist vera sannlíkt, at Fólkatingið verður kallað saman í úrtíð bert fyri at viðgera hesa lønartrætuna, heldur Esmar Berg, formaður í Føroya Lærarafelag.

Tann peningur, sum limir felagsins mistu við lønarsteðginum, hevur felagið fylgt upp við einum sakarmáli, sum kemur fyri í Føroya Rætti í oktober mánaði.

ÍSLANDSTÍÐINDI

REYKJAVÍK, DIMMALÆTTING (Sverrir Þórðarson)

Samfelagstænasta í staðin fyri fongsulsrevsing

Nýggj lógarbroyting um teir persónar, sum eru dømdir upp til 3 mánaðir treytaleyst revsitilhald, t.d. rúsdrekkakoyrarar, kemur í gildi 1. juli. Í staðin fyri at sita dómin í fongsli, fer viðkomandi persónur at kunna søkja um ólønta famfelagstænastu. Tey feløg ella stovnar, sum kunnu gera nýtslu av hesi lóg, mugu standa uttan fyri kappingarrakstur.

Lógin hevur verið viðgjørd síðani í januar, og styðjar seg m.a. til roynðir hjá donskum myndugleikum gjøgnum 20 ár.

Størsta vandamálið

Þorsteinn Pálsson fiskimálaráðharri sigur í samrøðu við Morgunblaðið sunnudagin, at størsta vandamálið í landsins fiskivinnu er tann veruleiki, at hópur av fiski verður tveittur í havið.

– Tað finst eingin sum helst umbering fyri, at fiskur, sum kann avreiðast, verður útblakaður. Her kann eingin loyva sær at offra framtíðarhugamál hjá tjóðini fyri bráðfeingis fyrimun. Men, leggur fiskimálaráðharrin aftrat, – at fremja skjótar ábøtur er sera føljaligt. Vit eru farnir undir at kortleggja hetta álvarsliga vandamál.

Einkarrætturin til rúsdrekkainnflutning avtikin

Altingið, sum kom saman til stutta setu eftir altingsvalið í mai, hevur útsett fundirnar til í heyst. Áðrenn farið varð heim, varð samtykt broyting í innflutningi av rúsdrekka. Higartil hevur ríkiseinkarsølan, ATVR, havt henda einkarrætt. Eftir at lógin um hetta er samtykt, verður einkarrætturin hjá ríkinum til innflutning av rúsdrekka settur úr gildi.

Altingið samtykti eisini at mótmæla avgerðina hjá bretsku stjórnini at loyva oljufelagnum Shell at søkkja í Atlantshavið boripallin Brent Spar við tí eiturevni, sum sigst vera um borð. Íslendska Altingið heitir á eingilsku myndugleikarnar at taka málið til umhugsunar av nýggjum.

Veiðikort krevst

Reglugerð, sum pliktar veiðimonnum at hava løggilt veiðikort, er komin í gildi her. Øll, sum veiða fugl, rev, mink ella fara á reindjóraveiðu, mugu vera loyvishavarar av veiðikorti saman við loyvi at hava skjótivápn.

Veiðikortið er bert galdandi í eitt ár, og tað verður ikki endurnýggjað, uttan at viðkomandi gevur fulla veiðifrágreiðing.

Kópafangarar hava ikki veiðikort fyri neyðini, og kort er heldur ikki neyðugt til at fanga rottur og mýs.

15.000 kvinnur runnu

Arligi «Kvinnurenningardagurin» fór fram sunnudagin við metluttøku av landsins kvinnum. Runnið varð víða um landið. Tær flestu á einum stað vóru í býnum Garðabær, har kvinnur úr Reykjavík og øðrum býum í høvuðsstaðarøkinum vóru savnaðar at vera við í renningini. Tær vóru her um 7000.

Samanlagt kring alt landið varð luttøkan um 15.000, í aldrinum frá børnum til oman fyri 80 ár. Strekkini vóru ymisk, og elstu damurnar noyddust at ganga seinasta teinin fyri at greiða sínt strekki. ▲

Viðmerkingar

Javnaðarflokkurin og Hendrik Old eru svartaspillan í føroyskum politikki

Undirritaði, harra Hendrik Old, er ikki valdur inn á Føroya Løgting til at ganga í fótasporum javnaðarmanna, men har aftur í mót at lúka og grøða tað føroyska samfelagið fyri svartaspillu.

Nú ið vælsmurda propagandamaskinari Javnaðarfloksins á blaðsiðu 3 í Dimmalætting nr. 89 aftur fór ígongd, so er tað flestu føroyingum klárt, at tað er Javnaðarflokkurin og tíanverri hjálptur av øðrum, sum eru atvoldin til, at føroyska samfelagið seinastu árini rotnar upp innanífrá. – Tað er júst hetta, sum føroyingar kalla fyri svartaspillu.

Ein má spyrja, hvar er fiskivinnupolitikkurin hjá Javnaðarflokkinum og formanninum í Fiskivinnunevndini?

Hendrik Old tosar um smærri broytingar longu um 2 mánaðir.

SMÆRRI BROYTINGAR, Hendrik Old, er tað, at friðaðu økini vestan og sunnan fyri Suðuroynna og aðra staðir við aftur skulu vera opin fyri trolveiðu? Tú vildi jú ikki verja hesi við at lógarfesta tey eftir ynski frá Heina O. Heinesen.

SMÆRRI BROYTINGAR, eru tað, at svínabinda allar trolbátarnar við kei dagin eftir, at tú hevur givið teimum trolloyvi á landleiðini?

Øll uttan tey reinvaskaðu fyri javnaðarhugsjónini duga at síggja, at hetta ber ikki til.

Smærri broytingar á skriviborðinum hjá Hendrikki Old fara framvegis at føra til, at følgur hjá fiskimonnum, skipaeigarum og bankum fara fyri skeyti, ja, til framhaldandi sorgarleik hjá mangari føroyskari familju.

Hendrik Old, tað er rætt at Kr.F. hevur ein greiðan fiskivinnupolitikk, sum er haldbarur eitt langt áramál í hesi umskiftiligu verð, hvar alt er relativt.

At ógvusligar broytingar á fiskivinnuøkinum henda líka ofta, sum tá menn skifta hosur, kemst av at fiskivinnupolitikkur Javnaðarfloksins bert hevur verið vina- og kenningarpolitikkur.

Jú, tað er satt, Hendrik Old, at Kr.F. er harðliga ímóti, at tú skalt standa skúlarætt niðuri á Christiansborg, hvørja ferð føroyingar ætla at flota eitt 4 mannafar.

Jákup Olsen

Tillukku við barninum

Hvønn leygardag ynskir Dimmalætting foreldrum tillukku við lítla barninum, annaðhvørt bara í tekstí ella í tekstí og myndum. Hetta gera foreldrini sjálvt av. Send bræðbjálvan til Dimmalætting, postboks 19, 110 Tórshavn merkt «Tillukku við barninum», skriva avsendara, navn og adressu, so vit kunnu senda myndina aftur sum skjótast. Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd í blaðið. Vit skulu hava myndirnar í seinasta lagi friggjamorgun. Um foreldrini ynskja tað, kunn myndafólk frá blaðnum taka myndina ókeypis. Ring 11212, og vit avtala nærri.